søkir eftir einum
## skrivstovufólki

**Arbeiðsuppgávurnar verða í høvuðsheitum**
At hava um hendi stovnsins skrivstovuarbeiði. Tað verður seg bókhald, lønir, flytingar, brævskriving, skrásetingar og arkiveringar; eitt nú post, hagtøl, góðskumappur, eftirmetingar, og annað. Luttaka í arbeiðinum at innføra góðskustýring á stovninum.

**Førleikakrøv**
- Viðkomandi útbúgving og skrivstovuroyndir
- Duga at arbeiða fjølbroytt og sjálvstøðugt
- Hava góð samstarvsevnir

Bókhaldið verður ført í Lundanum. Lønir- og fakturar yvir Com-Data skipanina, og flytingar yvir heimagreiðslu.

**Vit bjóða**
- Spennandi avbjóðingar
- Møguleika fyri skiftandi arbeiðstíðum
- Skeið møguleikar

**Løn og setanartreytir**
- Starvið hevur tilvísing til fyristøðufólkið.
- Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.
- Starvið verður at seta 18. august 2003, ella skjótast tilber.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Kristinu Larsen, fyristøðufólk á tlf. 211135.

**Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 30. juni 2003.**

Umsókn saman við prógvi, royndarváttan v.m skal sendast til:
Sjálvsognarstovnin ALV
Smiðjugerð 6, kj.
Postboks 301
110 Tórshavn

**Viðmerk á brævbjálvan: »umsókn skrivstovufólk«**

---

# Verkfrøðingur/ Byggifrøðingur

Søkt verður eftir verkfrøðingi/byggifrøðing til spennandi starv innan byggi- og anleggsarbeiði. Tann, ið settur verður, kemur at arbeiða sum plássleiðari.

Starvið verður sett skjótast gjørligt.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og CV skal sendast til

**P/F J & K Petersen**
Á Hjalla
Postboks 3179
FO-110 Tórshavn
í seinasta lagi 26.06.2003

J&K

Tlf. 315060
e-mail: JKP@JKP.FO

---

TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN

## søkir lærara til bildeildina

Starvið er eitt fulltíðarstarv.

Umsøkjarin skal hava sveinabræv sum bilmekanikkari og minst 2 ára starvsroyndir innan yrkið.

*Á bildeildini starvast 3 lærarar í føstum starvi, umframt 1 verkstaðarhjálpari.*

**Setanarkor til fast starv:**
Fyrstu 2 árini verða roknað sum royndartíð, har tann, sum verður settur í fast starv, má verða til reiðar at taka ta eftirútbúgving, tað verður seg pedagogiska/undirvísingarliga ella aðra førleikagevandi útbúgving, sum er neyðug fyri at verða settur í fast starv.

**Løn:**
Lønin verður sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og FTL.

Starvið skal setast 11. august 2003.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um útbúgving, viðmælum og starvstíð skal verða skúlanum í hendi áðrenn 27. juni 2003.

**TEKNISKI SKÚLIN Í TÓRSHAVN**
Marknagilsvegur 75 · Postsmoga 239
FO-110 Tórshavn
Telefon +298 311957 · Telefaks +298 316621
e-mail: tst@tst.fo
Heimasíða: www.tst.fo

---

FØROYA PEDAGOG FELAG

# Álitisfólkafundur

Útsetti álitisfólkafundurin verður á Hotel Hafnia
**mikudagin 25. juni kl. 13.00**

Skrá: Sáttmálasamráðingarnar.

Fundurin er fyri álitisfólk og fyri valdu eykalimirnar hjá nevndini.

**Føroya Pedagogfelag**

---

# SØLUFÓLK

Vit søkja eftir sølufólkið at byrja sum skjótast.

**Vøruhúsið í Runavík - tel 44 82 80**
spyr eftir Jørgen Frants

LITAVAL P/F

---

# Sernámsdepilin

**Stuðulsfólk til fjølbrekaðar næmingar í fólkaskúlanum skúlaárið 2003/2004**

Søkt verður eftir 4 fólkum til mennandi stuðuls- og røktararbeiði við fjølbrekaðum næmingum.

**Í Runavíkar skúla:**
2 fólk at arbeiða 25 tímar hvør um vikuna við 4 fjølbrekaðum næmingum.

1 fólk at arbeiða 22 1/2 tíma um vikuna við 2 næmingum við autismu.

**Í Oyndarfjarðar skúla:**
1 fólk at arbeiða 18 tímar um vikuna við 2 næmingum við autismu.

Arbeitt verður í neyvum samstarvi við skúlaleiðslu, foreldur og lærararnar, ið varða av undirvísingini. Eftir tørvi eisini við fakfólk í Sernámsdeplinum, lokalan serráðgeva og heilsusystir.

**Førleikakrøv:**
Serliga krevur arbeiðið tolsemi og samstarvsvilja. Fyrimunur er at hava námsfrøðiliga útbúgving og/ella førleikagevandi royndir.

**Løn:**
Eftir sáttmála við avvarðandi fakfelag.

Umsóknir við avriti av møguligum próvskjølum/-ummælum skal vera Sernámsdeplinum í hendi í seinasta lagi mánadagin 7. juli 2003.

Meira fæst at vita við at venda sær til skúlarnar ella til Hans Eli Dahl í Sernmámsdeplinum, tlf. 314522 – heima tlf. 314919/225803.

**Sernámsdepilin**
Frælsið 32 – Postrúm 2036 – FO 165 Argir
Telefon 314522 – Fax 310196

---

# Klinikkassistentur

Søkt verður hervið eftir avloysara fyri klinikkassistent í farloyvi í 1 ár, at arbeiða fulla tíð á Tannlæknastovuni á Skála, frá 15.08.2003 at rokna.

Lønin er samb. sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Starvsmannafelagið.

Skrivlig umsókn skal vera kommunuskrivstovuni í hendi seinast hósdagin 03.07.2003.

**Skála Kommuna**
480 Skála

---

**alfatransport**

Vit átaka okkum allan vøruflutning

Ring og fá eitt gott tilboð

tel 50 51 91 • t-post: alfa@kallnet.fo

---



**málingin til húsini fæst í**
# máling & gólv

Samstundis sum vit selja við stórum avsláttri av okkara málingagoymslu verður latið 10% í avsláttri av máling ið ikki er á útsølu - tilboðið er fyri innflutta máling

Til dømis:
STORMSHIELD
BETONMÁLING 10L fyrr 549,-
**-10%: nú 494,-**

TRÆVERJA 5L fyrr 399,-
**-10% nú 359,-**

SLITSTERK VEGGJAMÁLING
SILKIGLØTT 10L fyrr 499,-
**nú 449,-**

SLITSTERK MATT
VEGGJAMÁLING
10L fyrr 299,-
**-10% nú 269,-**

**Vit selja í løtuni RESTGOYMSLU MÁLING, TAPET OG FLISAR**

**Til dømis: MÁLING úr bert 10,- kr liturin**

**TAPET avsláttur úr 75%**

**stórur avsláttur**

**FLISAR til dømis: 7 kvadratmetur gólv flísar einans 250,- kr í alt**

Tel 316066 **máling & gólv**

Sosialurin 341800

---

## Lærlingur til eykalutagoymsluna

Søkt verður eftir lærlingi til eykalutagoymsluna at byrja beinanvegin.

Ein partur av útbúgvingini fer fram í Danmark.

Vit arbeiða eftir nýggjum goymsluhættum og krevur hettar at tú ert ágrýtin og røkin.

F.H.S. prógv krevst

Er hettar tú, so skriva nøkur orð um teg sjálvan.

Merk brævið "eykalutagoymslan"

**REYNI SERVICE P/F**
Vegurin Langi · Hoyvík · Box 1068
FO-110 Tórshavn · Tel 35 30 40

Sosialurin 341800

---

**Kaj Andreasen & Co**
Heilsøla • smásøla • umboð
Tel. 31 56 00 • www.andreasen.fo

## Stilladsútgerð og forskallingsútgerð

HÜNNEBECK

**Til keyps og leigu:**

- Fasadustillads
- Rullustillads
- Aluminiumstillads
- Forskallingar - Nógv sløg!
- Forskallingsútgerð: Forskallingsoljur, sproytur, klams, konus, avstandsrør, binditráður, bindimaksinur, fuguband, stoypibats/isolering, armeringsjarn o.a.



Leverandørurin til byggi-entreprenørvinnuna síðan 1970!

Sosialurin 341800

---

FØROYA LANDSSTÝRI

**Fíggjarmálaráðið**

# Varastjóri

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálaráðnum.

Uppgávur stovnsins eru m.a. at fyrisita
- skattalógina
- tolllógina
- mvg-lógina
- kolvetnisskattalógina
- avgjaldslógirnar, eins og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum

Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Tórshavn, Saltangará og Klaksvík røkja raksturin.

Í Stýrinum, har viðkomandi kemur at starvast, eru 30 starvsfólk.

Lýsingin finst eisini á heimasíðunum:
www.fmr.fo
www.tollskatt.fo

E-mail:
fmr@fmr.fo

Kundi tú hugsað tær at verið varastjóri í Stýrinum fyri Toll- og Skattstovu Føroya?

Tú kemur í tøttum samstarvi við stjóran at taka tær av leiðsluni á Toll- og Skattstovu Føroya, ið m.a. fevnir um hesar uppgávur:

- Seta mál og langtíðarplanlegging
- Fíggjarstýring
- KT-politikkur og KT-viðurskifti
- Trygdarpolitikkur og trygdarviðurskifti
- Innanhýsissamskifti øki og deildir
- Samskifti við borgarar og virki
- Uttanlandssamskifti
- Veita landsstýrismanninum í Fíggjarmálum tænastu
- Skatta- og avgjaldsfyrisitingarpolitikkur
- Eftirlitspolitikkur
- Innheintingarpolitikkur

Hevur tú visiónir, góð samstarvsevni, og ert tú ágrýtin, virkin og úrslitagóður, ert tú vælkomin at senda okkum eina umsókn. Leiðsluútbúgving og leiðsluroyndir kunnu vera ein fyrimunur.

**Krøv**
Útbúgving frá hægri lærustovni krevst, t.d. innan fak sum fíggjarstýring, kunningartøkni, fyriskipan o.a.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag og verður sett 1. september 2003. Starvið verður flokkað ájavnt við **37. lønarflokk** í tænastumannafelagssáttmálanum.

**Umsóknarfreist**
Kundi tú hugsða tær at roynt hesa avbjóðing, so send okkum eina umsókn, CV og viðmæli, innan mánadagin 30. juni 2003.

**Fíggjarmálaráðið**
Postboks 2039
165 Argir

Vilt tú frætta meir, ert tú vælkomin at ringja til Petur Alberg Lamhauge, aðalstjóra, á tlf. 352020.

---

Vit hava økt um virksemi okkara, og tí tørvar okkum fleiri starvsfólk.

Vit sóknast eftir:

## Fólki til handilin
og
## bakaralærlingi

Hevur hetta tín áhuga, so ring ella skriva til:

**P/F Frants Restorff**
Tórsgøta 13
Postsmoga 41
110 Tórshavn
Tlf. 311060

frants restorff

Sosialurin 341800

---

# Fólk søkist til handilin

**Feriuavloysarar**
**Avloysari at taka til** (t.d. vegna sjúku)
**Fólk til vikuskiftini**

Arbeiðstíðirnar eru hesar:
kl. 06.00–13.00
kl. 13.00–19.00
kl. 19.00–23.30

Skrivlig umsókn at senda til:

**P/F Frants Restorff**
Tórsgøta 13
Postsmoga 41
110 Tórshavn
Tlf. 311060

Spyr eftir Louisu.

frants restorff